# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin -
í Sosialinum hvønn hósdag**



**CITROËN XANTIA 1,6l**
Árg okt. 1994, Citroën Xantia til sølu. Bilurin er nýsýnaður, hevur koyrt 170.000 km harav 130.000 í Danmark. Sær gott út og hevur bert havt tveir eigarar. Roykfríur bilur. El-síðurútar framman og krók. Prísuppskot: 45.000 krónur. Ring
**Tlf. 320345 ella 213345** .



**MERCEDES-BENZ SPRINTER 412 TURBO DIESEL**
Árg 1999, Km 45.000. Við last og presending. Bilurin er til stóra koyrikortið. Prísuppskot: kr. 140.000,- + mvg.
Tel. 584040



**MERCEDES BENZ 200 D ÁRG. 1966**
Árg 1966, Hetta snotuliga ellisakfar, sum er í góðum standi, er til sølu. Bilurin er høvuðsumvældur og sproytlakkeraður fyri uml. tveimum árum síðani. Sum ellisakfar rindar hann ongan vegskatt og sera lítið í trygging.. Kr. 40.000.
**Tel 216409. ellis@post.olivant.fo**



**NISSAN ALMERA 1,6 SR**
Árg des.1996, Km 142.000. Bilurin er í sera góðum standi, hevur el-síðurútar, el-síðuspegl, setrallás, 15'' alu-felgur við góðum dekkum, og gott Pionér-anlegg við allari útgerð. Kr. 65.000.
Tel. 210304



# PETRA í forsølu

**Á middegi í dag verður farið undir at selja tey 630 atgongumerkini til PETRA konsertina, sum verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 19. apríl**

**TÓNLEIKUR**
*Eyðun Klakstein*

Sum tað varð nevnt í blaðnum nakað her fyri, so fer heimskendi bólkurin, PETRA, at vitja her í apríl.

Á ferð í Europa fer amerikanski bólkurin at hava fýra konsertir - í Sveis, Týsklandi, Danmark og í Føroyum.

Konsertin verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði týsdagin 19. apríl klokkan 19.30. Í dag, hósdagin 31. mars, klokkan 12 verður farið undir forsøluna. Talið av atgongumerkjum er avmarkað til 630. Prísurin er 200 krónur pluss søluavgjaldið, og forsølan er í Kunningarstovunum í Klaksvík, Fuglafirði, Runavík, Havnini og á Flogvøllinum.

PETRA hevur eina ferð áður verið í Føroyum. Tað var í 1992. Í 1993 vitjaði ein av limunum, John Schlith, einsamallur í Føroyum. Hann hevur seinastu umleið tjúgu árini verið sangari í PETRA.

Í PETRA eru seks limir. Saman við John Schlith man Bob Hartman vera tann, sum fólk mest komast við. Hann hevur verið við í eini fjøruti ár. Hann er sangari, og so er hann serliga kendur fyri guitarspælið. Bob Hartman og John Schlith hava gjørt nógvar av tekstunum og nógv av løgunum hjá PETRA.

Tað eru Andrew Djurhuus og Símun J. Hansen, ið hevur nógvar royndir, hvat hesum viðvíkur, sum standa fyri vitjanini hjá PETRA í Føroyum.

# Stevna Google eftir 100 mió kr.

Tíðindastovan AFP krevur nú 100 milliónir í endurgjaldi frá Google fyri brot á lógina um upphavsrætt.

Ein partur av tænastunum á Google er sonevnda Google News, har tíðindi og myndir frá øllum heiminum verða víst. Trupulleikin er, at hetta verður gjørt á sama hátt sum indekseringsskipanin á vanligu Google leitiskipanini, og at teksturin frá ymsu tíðindasíðunum tí verður avritaður, uttan at nakað loyvi liggur aftan fyri hetta.

Sambært AFP hevur Google als ikki latið við seg koma, hóast fleiri áheitanir, og tí stevndi tíðindastovan at enda internet-fyritøkuni. Eftirfylgjandi hevur Google tikið allar greinar og myndir, sum hava ávísing til fronsku tíðindastovuni av skipanini.

**-jm**

Lesið Sosialin - so eru tit við